# Heilsurøktarin í fokus í Miðlahúsinum

Almanna- og heilsurøktarafelagið og Føroya Psykiatrifelag skipa fyri almennum tiltaki í Miðlahúsinum mánakvøldið 16. mai kl.19.00.

Endamálið er at fáa at vita, "hvussu heilsurøktarin verður brúktur á arbeiðsmarkaðinum í dag".

Panel luttakarar: Helena D. á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum, Mary í Garði, stjóri í Nærverkinum, Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almannamálum og Naina Túgvustein, varastjóri á Landssjúkrahúsinum.

Orðstýrari verður Rigmor Dam.

**Hetta kvøldið leggja vit upp til:**

- kjak og dialog um okkara leiklut á arbeiðsmarknaðinum
- at luttakarin fær kunnleika um førleikarnar og kvalitetin hjá heilsurøktarum

Heilsurøktarar vilja fegnir samstarva við allar starvsfólkabólkar í almanna- og heilsuverkinum.

Tí vilja vit bjóða leiðslum og øðrum samstarvsfeløgum, so sum sjúkrarøktarfrøðingum, pedagogum, ergo- og fysioterapeutum, heilsuhjálparum, ljósmøðrum, lærarum og læknum at koma til hetta tiltakið. Onnur áhugað eru eisini vælkomin.



Mynd: Jens Kristian Vang

# Listaframsýning á Torginum

Mánadagin 16. mai letur ein framsýningin hjá Sofusi Poulsen upp á Torginum í SMS.

Talan er um eina framsýning við umleið 30 oljuog vatnlitsmálningum, sum allir eru málaðir í 2011. Myndevnini eru úr føroysku náttúruni, og málningarnir taka støði í skiftandi náttúruni og føroyska veðurlagnum, umframt grindadrápi, føroyska dansinum og relief-myndir um Jesu lív.

Hetta er aðru ferð at Sofus sýnir fram á Torginum, og framsýningin er opin til og við leygardagin 21. mai. Umframt hesa framsýningina hevur Sofus eina permanenta framsýning í máleraskemmu síni í Kvívík.

# SUBTALES – ariir úr miðalstættini

Svenskt/Finskt/Norskt/Íslendski leikbólkurin SUBFRAU kemur nú aftur á vitjan í Føroyum.

Leikbólkurin SUBFRAU hevur síðan bólkurin varð stovnaður bjóða tí norðulendsku uppfatanini av kynsrollum av. Og eftir tíggju ár er tíðin komin til eitt realitycheck! Hvussu er, í roynd og veru, støðan hjá javnstøðuni?

Tað norðurlendska vælferðarsamfelagið sigst vera fyrimyndarligt. Her siga kvinnur seg hava tað best. Men hvussu ber tað til at vit blíva útbrendar, tá vit búgva í einum samfelag sum tekur sær bæði av børnunum og foreldrunum hjá okkum? Er tað frælsi og ríkidømi sum gera okkum sundurstrongdar av krøvunum um 13/4 pen børn, 1 penan mann, krøvunum um at vera kreativ á arbeiðsplássinum og sexut heima, at hava milda rødd, mammu á ellisheimi, vermammu til umlætting, arbeiðstelduna á køksborðinum, bollar í ovninum, fasta flyting til Amnesty og Spa í vikuskiftinum.

Vit leggja okkum sjálvar undir lupp, okkara sjálvræði og serliga feminismuna, sum vit allar eru so góðar við – okkara norðurlendska flaggskip. Hvør er partur av javnstøðuni? Vit hava varhugan av at tað eru ikki øll. Hvørjar eru feministar? Og hví fáast vit við sovorðið? Skulu vit knúsa alt sundur, saman? Hvør vil byrja? Og hvør verður so eftir?

Vit skilja ruskið. Vit vóna at eisini smátingini kunnu skapa broyting. Vit hugsa um deyðan. Vit leggja familjuhugnakvøld við lørdags-pizza afturum okkum. Vit rýma av skútuni. Vit heiðra Mou Martinsson og Spiderman.

Vit syngja. Vit skríggja. Vit berjast. Vit flúgva. Vit dansa. Tvætla býtt og øsa okkum upp. Vit kempa. Og spekulera uppá um Gud er mannfólk – ella hvør er tað sum skapar alla mótstøðu?

Vit gera okkara besta og eitt sindur afturat. Á svenskum. Á finskum. Á norskum. Á íslendskum. Niður og norður við øllum skipanum!

SUBFRAU vóru seinast á Tjóðpallinum í 2007 við leikinum "Pretty Subfrau" . Tey, sum sóu tann leikin vita hvat tey hava í væntu: Stuttligt og provokerandi, fúlt og fitt, álvarsamt og svakt – alt í senn.

Sýningar verða á Tjóðpallinum týsdagin 17. mai og mikudagin 18. mai kl. 19.30.

# Atlantic Airways betri úrslit fyrsta ársfjórðing í ár enn í fjør

**ATLANTSFLOG Úrslitið hjá Atlantic Airways fyrsta ársfjórðing í 2011 var eitt hall eftir skatt á 2,1 milliónir krónur samanborið við 5,7 milliónir krónur í halli sama tíðarskeið í 2011**

Eirikur Lindenskov

Fyrsti ársfjórðingur er vanliga lakur, men í ár er úrslitið betri enn í fjør, tí bæði framleiðslan og sølan eru vaksin.

Á grundrakstrinum var inntjeningin hjá felagnum 9,3 milliónir krónur fyrsta ársfjórðing í ár samanborið við 6,8 milliónir krónur í fjør. Samlaða sølan vaks úr 78,8 milliónir krónur fyrsta ársfjórðing í fjør upp í 84,3 milliónir krónur sama tíðarskeið í ár.

– Vit høvdu eitt flogfar færri í rakstri fyrsta ársfjórðing í ár, men talið á flogtímum er vaksið 20 prosent. Á hendan hátt er felagið vorðið effektivari, og hesa gongd fegnast vit um, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways.

Síðan 2008 hevur stígur verið í bæði rutuflúgvingini og leiguflúgvingini, tí búskaparligu umstøðurnar versnaðu. Leiguflúgvingin er tó nógv økt fyrsta ársfjórðing í ár, heili 135 prosent. Í flogtímum øktist leiguflúgvingin úr 210 tímum fyrsta ársfjórðing í fjør upp í 494 tímar í ár. Felagið fleyg leigutúrar fyri ymsar operatørar í Evropa, m.a. í sambandi við skíðferðir.

Rutuflúgvingin minkaði 7 prosent fyrsta ársfjórðing í ár samanborið við í fjør, men havast skal í huga, at páskirnar í fjør vóru í mars, tá nógv flúgving var. Hóast lækkaða ferðafólkatalið og hækkandi oljuprísir stóð felagið seg betur í mun til sama tíðarskeið í fjør, tí eindarkostnaðirnir vóru lægri.

Atlantic Airways hevur í vár tikið stig til fleiri átøk, ið skulu økja um áhugan at flúgva til Føroya. Í Danmark hevur lýsingarherferðin Together sett bæði Føroyar og Atlantic Airways á breddan, og hetta hevur økt um søluna serliga annan ársfjórðing. Talið á luttakarum á ferðavinnustevnuni Visit Faroe Islands í síðstu viku var eisini metstórt.

Eisini í Íslandi og Bretlandi hevur felagið skipað fyri átøkum saman við samstarvsfeløgum, og í summar verður farið undir at flúgva til Bergen. Í Noregi virka samstarvsfelagar hjá Atlantic Airways fyri, at fólk verða gjørd varug við hendan nýggjan ferðamøguleikan.

– Hóast vit hava havt avbjóðingar fyrsta ársfjórðing í ár við høgum oljuprísum og ringum veðurlíkindum, so fegnast vit um, at støðuga arbeiðið at effektivisera raksturin framvegis ber ávøkst. Felagið hevur lagt nógva orku í at marknaðarføra Føroyar sum ferðamannaland, men tann menningin hevði gingið munandi skjótari um ferðaavgjøld og skattir minkaðu ella hvurvu, sigur Magni Arge.

Atlantic Airways væntar framhaldandi eitt betri úrslit í ár enn í fjør, men ásannar, at prísurin á brennievni kann ávírka hetta.

# »Boð og birting« við Rútmiska Kórinum í Hoydølum

**SANGUR Nú er lív aftur komið í Rytmiska Kórið í Hoydølum, sunnudagin verður vígslukantan til Studentaskúlan í Hoydølum framførd**

Eirikur Lindenskov

Eftir at kórið mest sum bara hevur tikið sær av vælumtóktu sangleikunum seinastu árini, og ikki havt orku til nógv meira, ljómar kórsangurin frá ungu røddum.

Seinastu dagarnar hevur kórið tikið kórsang upp til Kringvarpið. Talan er um kantatuna »Boð og birting«, sum Eyðun Sørensen og Karsten Hoydal skrivaðu til vígsluna av nýggja studentaskúlanum í Hoydølum í 1966. Tað løgna var tó, at skúlin ongantíð varð vígdur, og kantatan tí ongantíð varð formliga frumframførd. Ein av sangunum í kantatuni munnu flestu fólk kenna nevnliga »Landið eg bar við mær«, sum vanliga verður sungin við lagi eftir Hans Jákup Højgaard. Men kórið syngur kantatuna við løgunum hjá Eyðun Sørensen.

Rytmiska Kórið í Hoydølum hevur konsert sunnudagin 15. mai kl. 16.00 í samkomuhøllini í Hoydølum. Hans Pauli Tórgarð er kórleiðari. Her verður brot úr kantatuni framførd. Kórið leggur tó dent á rútmiskan tónleik innan fleiri sjangrur, við solistum. Eisini verða spennandi framførslu saman við jazz/fusion bólkinum A Blue Journey. Bólkurin fer eisini at hava sjálvstøðugar framførslur.